Spennandi og avbjóðandi starv sum

# Marknaðarleiðari hjá Atlantic Airways

Atlantic Airways skal hava nýggjan marknaðarleiðara.

Leiðarin hevur ábyrgdina av allari marknaðarføring og sølu hjá felagnum og skal í samstarvi við stjórn felagsins menna eina marknaðar- og sølustrategi, ið skal tryggja at felagið framhaldandi mennist. Marknaðarleiðarin verður partur av leiðslubólkinum og skal saman við hesum vera við at tryggja kappingarføri felagsins.

Marknaðarleiðarin hevur ta strategisku menningina av deildini um hendi, skal leggja ætlanir fyri átøk, implementera verkætlanir, røkja samskifti við viðskiftafólk, røkja og menna samskiftið við samstarvsfelagar heima og uttanlands.

Tað er ein fyrimunur, um viðkomandi hevur innlit og royndir innan vinnugreinina, altjóða royndir, og hevur útbúgving innan marknaðarføring og sølu.

Viðkomandi skal hava góð evni at samskifta, bæði í skrift og talu, hava góð evni at skapa og viðlíkahalda netverk, umframt duga at síggja góðar inntøkumøguleikar.

Talan er um eitt krevjandi men spennandi, avbjóðandi og mennandi starv. Neyðugt er at hava hug og umstøður til lutfalsliga nógva ferðing uttanlands.
Lønin verður ásett eftir avtalu.

Um fleiri upplýsingar ynskjast, kanst tú venda sær til Magna Arge, stjóra, tel 341000, magni@atlantic.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. oktober 2007, og skal sendast til:

Atlantic Airways
Starvsfólkadeildin
FO-380 Sørvágur

sansir.fo

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka, hvørs virkismentan er eyðkend av, at fokus altíð er á trygd, stundvísi, kundan og úrslitið. Umleið 200 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, sum hevur heimstað í Sørvági. Árligi umsetningurin í 2006 var 519 milliónir krónur.
Atlantic Airways hevur fimm flogfør og tríggjar tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Hetlandi, Íslandi, Grønlandi og Noregi. Harumframt er virksemi víðfevnt í øðrum londum við leiguflogførum, og umleið helvtin av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrludeildin røkir ferðasamband til útoyggjarnar, leiti- og bjargingartænastu og off-shore flúgving í Norðurhøvum.

Tel 34 10 00 · Faks 34 10 01 ATLANTIC AIRWAYS atlantic.fo



Christian Stadil

Sum partaeigari og kreativur leiðari í fyritøkuni Hummel hevur Christian Stadil upp á stutta tíð gjørt danska klædnanavnið til eitt av heimsins best umtóktu ítróttar- og mótamerkjum.

Hann er buddistur og ein av mest karismatisku vinnulívsmonnunum í Danmark – lutvíst av sínum vituga sinni, lutvíst av síni serligu útsjónd, ið skapar eina ímynd av einum munki.



# Company Karma

– um at finna síni sereyðkenni sum fyritøka og menniskja

Fyrilestur við Christian Stadil um eitt turnaround, um branding, sjálvsálit, marknaðarføring og tað at finna sítt egna sereyðkenni.

Fyrilesturin verður í Havnar Bio fríggjadagin 28. september kl. 14.00
Aftaná verður okkurt lætt at fáa í Havnar Klubba.

KOSTNAÐUR
Limir í Arbeiðsgevarafelagnum og Reklamufelagnum kr. 400. Ikki limir kr. 700

Tilmelding fer fram á www.industry.fo
ella á tel. 30 99 00

REPROZ

VINNUHÚSIÐ
House of Industry
REKLAMUFELAGIÐ